# oljurokningini



Fyri tíð síðan fekk Ólavur Frederiksen sær sólfangarar á húsatekjuna



Ólavur Fredetiksen ætlar sær at fáa sær eina vindmyllu sum hesa. Tó skal hon vera svørt



Fyrsta umhvørvisíløgan hjá Ólavi Frederiksen var í eina hitapumpu, so hann kundi sleppa undan svingandi oljuprísinum

**Skilir hini**

Hóast Ólavur Frederiksen ikki vil síggja olju, so skilir hann væl tey, sum ikki vilja gera hesar íløgurnar.

– Men tað hevði borið til at fingið fleiri at gjørt hesar íløgurnar, um landið loyvdi tí. Antin við hægri av-gjøldum á oljuni ella við at regulera meirvirðisgjaldið, heldur Ólavur Frederiksen, sum sostatt skjótt fer at koyra í einum grønum elbili, løddur við egnari vindmyllu og føroyskum vindi.

– Tú kanst nokk siga, at eg eri blivin ein miljøaktivistur við árunum, og nú havi eg eisini fingið konuna upp á vognin, gleðist Ólavur Frederiksen.

Eirikur í Jákupsstovu
eij@sosialurin.fo

